# Írski landsliðsvenjarin sekkjaður

Leiðslan í írska fótbóltssambandinum FAI, er ikki nøgd við, at írska fótbóltslandsliðið bert hevur fingið 16 stig í 11 dystum í EM-undankappingini. Tí hevur gamla Liverpool og Aston Villa legendan Steve Staunton fingið sekkin. Og ikki nóg mikið við tí. Hjálparvenjarin Kevin McDonald og málmansvenjarin Alan Kelly hava eisini fingið sekkin. Tað eru serliga úrslitini ímóti Kýpros, sum ikki hava verið nøktandi. Írland tapti 2-5 á Kýpros, og á heimavølli fingu teir bert javnleik 1-1. Á útivølli ímóti San Marino mundi gingið galið. Tá fekk Írland sigursmálið í yvirtíðini. Formaðurin í FAI; David Blood er vónsvikin av úrslitunum, og sigur, at fólk við góðum innliti til altjóða fótbólt fara at finna tann rætta avloysaran. Steve Staunton avloysti Brian Kerr 1. januar 2006. Brian Kerr var venjari, tá Írland tvær ferðir vann 2-0 á Føroyum í seinastu HM-undankapping.



# John heldur fram á Skála

John Petersen og Skála hava gjørt av, at samstarvið millum partarnar heldur fram í minsta lagi eitt ár afturat. John gjørdist venjari, tá Skála gjørdist fyrsta felagið í Formuladeildini, sum segði venjara sín úr starvi. Eftir hetta vendi gongdin hjá felagnum nakað, og seinastu nógvu umførini hevur niðurflytingarvandin ikki verið nakað, ið fólk á og kring Skála hava givið serliga nógvan ans.



*Føroyar-Kroatia í U-21 landsdysti. Hvør veit, um ikki onkur av hesum verður at síggja í Superliguni í Danmark, innan longi*

metir hann at tað er av týdningi at fáa eina sterkari fíggjarliga støðu, so man er klárur at taka kampin upp.

## Hugtakið F.C. Amager

Hugtakið F.C. Amager, inniber at man roynur at samansjóva øll feløg á Amager, uttan tey sosialu feløgini, undir einum, F.C. Amager. –Tað eru umleið 15 feløg, ið møguliga áttu at verið við í hesum tiltaki, og samráðingar eru við hesi. Vónandi fáa vit hesi samansjóvaði áðrenn næsta kappingarár, tá vit væntandi ætla at byrja uppá hetta, sigur ein spentur Todi.

## Føroyingar í felagnum

Millum føroyingarnar, ið hava spælt við Fremad Amager, kunnu nevnast Andrew av Fløtum, Jann Ingi Petersen, Hjalgrím Elttør og Tem Hansen. Teir, ið nú eru í hópinum, eru Hans Jørgensen, Erling Jacobsen, Páll Klettsgarð og Jóhan Ellingsgaard.

Hesir seinastu, ið nevndir eru, eru allir ungir føroyskir leikarar, ið eru í holt við einari menning, ið, um hon heldur fram, fær givið teimum ómetaliga nógv. Todi sigur seg ikki ivast í, at um framgongdin/menningin forsetur, hjá hesum unglingum, vera teir at síggja á besta liði felagsins, innan eitt ár.

## Menningin

Todi er av teirru áskoðan, at hann fegin hevði viljað verið við til at ment føroyskir leikarar, so at landsliðsfótbólturin her í Føroyum fær eitt alt størri streym av ungum, evnaríkum spælarum, ið kunnu vera við til at lyfta okkum hægri upp eftir styrkislistanum.

- Eg vil vera við til at menna føroyska landsliðið, soleiðis, at vit her á Amager kunnu upplæra nakrar ungar føroyingar, ið á hendan hátt fáa íblástur til yrkisfótbólt og leita sær leiðir uttanlanda at spæla fótbólt, í alt størri mun.

## FAKTA

Fremad Amager er eitt danskt fótbóltsfelag á Amager. Besta lið felagsins spælur í 2. deild, meðan næstbesta liðið spælur í Seriu 1 undir Københavns Boldspil-Union (KBU). Felagið var sett á stovn í 1910, og í 1929 fluttu teir upp í divisiónsregi, og longu eftir fáum árum var felagið í bestu deildini. Sum við so nógvum øðrum feløgum, hava tað verið góðar tíðir, og minni góðar tíðir, men felagið er tó ongantíð farið niðurum divisiónsregi aftur. Teir hava megnað at hildið seg harumleiðir, síðan 1929.
Arbeiðarafelagið er skipað í tveimum nevndum, einari amatør nevnd og einari professionellari nevnd, har núsitandi nevndarformaðurin Todi Jónsson og samtakið Fremad Amager Invest A/S, eru høvuðseigarar.

**Umstøðurnar**
Felagið venur og spælur sínar dystir í Sundby Idrætspark, og hevur egið felagshús, við matstovu, skrivstovum og skiftirúmum til seniorarnar. Ungdómsspælarar felagsins og teirra mótstøðumenn skifta í skiftirúmunum í Sundby Idrætspark, orsakað av plásstroti í felagshúsinum.

**Kend nøvn**
Av kendum nøvnum, ið hava spælt í felagnum av Amager, teljast stjørnur sum Frank Arnesen og Søren Lerby. Hesir vórðu í 1975, báðir seldir til hálendska stórfelagið AFC Ajax. Tá vóru hesir, nú kendu fótbóltsnøvn, bert ávíkavist 18 og 17 ára gamlir.
Lerby var somikið ungur at pápi hansara, Kaj Lerby, noyddist at skriva undir sáttmálan fyri sonin.

**Forkunnugt**
Fremad Amager kann av røttum kalla seg einasta ósigraða danska liðið í europeiskum kappingum. Vejle Boldklub vann The Double í 1972, og tískil skuldi teir av Amager á fyrsta sinni í søgu felagsins, spæla europeiskan fótbólt, meðan meistararnar úr Vejle valdu at luttaka í meistarakappingini. Lutakastið hjá UEFA paraði felagið við tveir dystir móti KS Besa Kavajë frá Albania. Fyrsti dysturin, á heimavølli í Valby Idrætspark, endaði 1-1 eftir at Erik Ryde javnaði í 67. minutti. Seinni dysturin í Durres bleiv ein rótutur dystur, uttan mál. Fremad Amager reyk tessvegna út úr kappingini uppá minst møguliga munin - rekulin um útivallarmál. Men eftir stendur, at Fremad Amager kann reypa sær av at vera einasta danska liðið, ið enn ikki hevur tapt í Europa Cup.




